# ítróttur

Nr. 145 • mikudagur • 1. august 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

# – Tað var léttari enn væntað

*– Eg havi ongar skaðar at stríðast við í løtuni, og eg eri annars í toppform, so tað er hugaligt at fara at fyrireika seg til kappingina um heimsins sterkasta mann, sigur Regin Vágadal*
*Mynd: Jens Kristian Vang*



**Regin Vágadal var næstan ovfarin av, hvussu væl kappingin á ólavsøku eydnaðist hjá honum**

STERKIR MENN
*Eyðun Klakstein*

Regin Vágadal var tryggur vinnari av Atlantic Giant, og hann var eitt sindur ovfarin av úrslitinum.

– Eg hevði ikki roknað við, at tað fór at ganga so væl hjá mær. Allar kappingarnar eydnaðust væl, og eg kenni á mær, at eg havi ongantíð áður verið so væl fyri, sigur Regin Vágadal.

– Tað var stórt spell, at so nógvir skaðar vóru í kappingini, men eg hevði alla tíðina roknað við, at Janne Virtannen fór at verða drúgvur, og soleiðis var eisini.

## Sera væl fyri

Regin Vágadal hevur vant nógv seinastu mánaðirnar, og hann er sera væl fyri.

– Eg havi ongar skaðar at stríðast við í løtuni, og eg eri annars í toppform, so tað er hugaligt at fara at fyrireika seg til kappingina um heimsins sterkasta mann, sigur hann.

Hendan kappingin verður hildin í Zambia í september mánaði, og tá Regin júst hevur vunnið kapping móti heimsins sterkasta, er tað ikki óhugsandi, at hann kann fara at gera vart við seg í hesi kapping.

Regin vil tó ikki spáa um úrslitið, men hann staðfestir bara, at hann er væl fyri.

– Skalt tú koma langt í kappingini um at gerast Heimsins sterkasti, so skalt tú klára teg væl í øllum kappingunum. Tað er ikki pláss fyri at kiksa í nakrari kapping, tí so rýkur tú út, sigur hann.

# Christian Høgni er smáskaddur

**Tað kemur ikki upp á tal at tosa um sáttmála við Esbjerg fyrrenn føroyski spælarin er førur fyri at vísa, hvør dugur er í honum**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*

Hvussu gongst tað hjá Christian Høgna Jacobsen í Esbjerg. Tey eru ivaleyst mong, sum hava hugsað henda spurningin, síðani vit fyri fjúrtan døgum síðani søgdu, at teir í Esbjerg vóru áhugaðir í at knýta hann afturat sær.

Tá tað snýr seg um møguleikan fyri sáttmála í Esbjerg, so er einki nýtt at frætta frá Christiani Høgna. Svarið upp á tann spurningin er fyribils útsett.

Orsøkin er tann, at Christian Høgni í løtuni gongur skaddur niðri í Esbjerg. Talan er um ein lítlan vøddaskaða í lærinum. Skaðin kom, tá Christian Høgni fyri viku síðani spældi við næstbesta liðnum hjá Esbjerg, sum vann 1–0. Tað var í 2. hálvleiki, at Christian Høgni noyddist at taka seg av vøllinum.

– Tað ber til at renna, men eg fái ikki vant saman við hinum. Tað ber ikki til at sparka bóltin. Eg rokni við, at tað gongur ein vika afturat, áðrenn eg aftur fái vant við fullari ferð, sigur Christian Høgni Jacobsen úr Esbjerg.

Roknar tú við, at tú so at siga skalt byrja av nýggjum?

– Bóltkenslan verður ikki so góð beinanvegin, men eg haldi ikki, at konditiónini bilar so nógv, tí eg renni hvønn dag.

## Kanónin manglaði

Besta liðið hjá Esbjerg spældi í vikuskiftinum fyrsta landskappingardystin í hesum kappingarárinum. Teir vóru í Lyngby. Heimaliðið vann 2–0.

Í umrøðunum aftaná sást í donsku fjølmiðlunum, at Esbjerg hevði havt eina røð av møguleikum at skora mál, men teir vóru ikki nóg avgjørdir frammanfyri málið, og so var tað fyri Esbjerg óheppið, at Lyngby málverjin akkurát í hesum dystinum spældi so væl, at hann varð kosin sum besti málverjin í Danmark í 2. umfari í superliguni.

Orsøkin til at Esbjerg bara hevur spælt ein landskappingardyst, er tann, at teirra dystur í fyrsta umfarinum í nýggju superliguni varð útsettur. Teir skuldu havt spælt í Odense ímóti OB, men OB átti tríggjar spælarar á danska U–18 landsliðnum, sum luttók í EM endaspælinum, og so siga reglurnar, at landskappingardystirnir kunnu útsetast.

Dysturin ímillum OB og Esbjerg er útsettur til miðskeiðis í september. Kanska Christian Høgni Jacobsen tá verður eitt møguligt evni til pláss í álopinum hjá Esbjerg.

# FCK í Parkini í kvøld

**Todi Jónsson er ikki tøkur, men tað fer honum møguliga at bera til at spæla miðskeiðis í komandi viku**

Í kvøld verður ein sera spennandi fótbóltsdystur í Parkini í Keypmannahavn. Tað er FCK, sum fer at spæla seinna dystin í 2. innleiðandi umfarinum í Europa Cup fyri meistaralið. Úrslitið síðsta mikukvøld í Georgia var 1–1.

Todi Jónsson telist ikki millum teir spælararnar, sum Kent Karlsson fer at velja teir fyrstu ellivu ímillum í kvøld. Tað er ein annar FCK álopsspælari, Patrick Simpson, heldur ikki. Hann er eisini vøddaskaddur.

Um úrslitið í kvøld verður 0–0 ella um FCK vinnur, so verður talan um rættuligan stórdyst í Parkini komandi mikukvøld. Samlaði vinnarin í kvøld skal spæla ímóti italska Lazio, og tað verður vinnarin í kvøld, sum fer at hava heimavøll í fyrra dystinum ímóti Lazio.

Tað er ein møguleiki fyri, at Todi Jónsson verður tøkur komandi mikukvøld. Í hesi vikuni er Todi aftur farin at venja við fullari ferð saman við liðfeløgunum.

Spurningurin er so, um FCK venjarin beinanvegin fer at taka føroyska álopsessið inn á liðið í staðin fyri annan av álopsmonnunum. Vit søgdu í gjár, at framrættaðu menninir, sum Todi skal kappast um álopspláss við, allir skoraðu ímóti Vejle sunnudagin. Heine Fernandez skoraði tvey mál, og Zuma og Carsten Fredgaard skoraðu eitt í part. So tað verður torført hjá Toda Jónsson, men hann hevur áður víst, at hann megnar eftir skaðasteðg at koma aftur á liðið og har at gera um seg.

**jh**

# OB vann á Silkeborg

**Síðsti dysturin í øðrum umfari í donsku landskappingini varð spældur mánakvøldið. OB hevði í Odense vitjan av Silkeborg. Úrslitið var tað, at heimaliðið vann 3–1. Hetta var fyrsti dysturin hjá OB í nýggja kappingarárinum**

Bronsuvinnararnir frá í fjør, Silkeborg, komu á odda í 1. hálvleiki. Tað var longu í 6. minutti. Í 16. minutti javnaði OB. Henda støðan helt sær til tað restaði eitt korter. Tá skoraði OB aftur. Tey bæði fyrstu OB málini skoraði Kasper Dalgas, sum teir í summar fingu úr Vejle. Fyrrverandi fótbóltsútisetin, Søren Andersen, staðfesti sigurin.

Hjá Silkeborg tykist tað vera eitt sindur truppult, eftir at teir í summarsteðginum mistu Henrik Petersen til Bolton og Thomas Røll Larsen til FCK.

Triðja umfarið í superliguni verður spælt í vikuskiftinum. Tá sær skráin soleiðis út: AaB–AB, Brøndby–OB, Esbjerg–Vejle, FCM–FCK, Silkeborg–Lyngby og Viborg–AGF.

**jh**



# Sterki maðurin á B5



*Starvsfólkið á B5 hava havt sítt at síggja til hesar dagarnar, tá sterki litavin hevur ligið á deildini.*



*Tað var undir kappingini leygardagin, at Zydrunas Savickas knappliga fall til jarðar. Her síggja Jón á Steig, lækna, koma honum til hjálpar.*

**Sterki litavin, Zydrunas Savickas, kom illa fyri, tá hann luttók í Atlantic Giant á ólavsøku. Knøini vórðu illa skadd, og sjálvur sigur hann seg vænta, at tað fer at taka í minsta lagi eitt ár at koma fyri seg aftur.**

SJÚKRAVITJAN
*Heri á Rógvi*

Tá hurðin á lyftuni fer upp á B5 á landssjúkrahúsinum, og vit koma út, er tað ein risa móttøka vit fáa. Beint frammanfyri lyftuna standur Zydrunas Savickas úr Litava. Hesin stóri maður er ein metur og hálvfems sentimetrar til longdar og vektin liggur um 153 kg. Hann hevur luttikið í kappingum á hesum støðinum í tvey ár nú, men hevur vant í nógv fleiri ár. Tað er ikki júst feitt, sum ger, at hesin prúði maður vigar somikið nógv.

Greitt er, at hesin maðurin er sterkur, og tað er eisini hetta navn, sum verður nýtt um Zydrunas Savickas á deildini - tann sterki maðurin eitur hann á deildini. Tað er heldur ikki lítið sum eyguni spílast út á gestum, starvsfólki og patientum, tá hesin risin spakuliga fer eftir gongini. Orsøkin til, at hann má ganga seint eftir gólvinum skyldast skaðan, sum hann fekk í kappingini, Atlantic Giant, á ólavsøku. Soleiðis at ólavsøkan gjørdist eitt heldur keðiligt upplivilsi fyri tann núverandi, og helst eisini nakrantíð, sterkasta mannin á B5.

## Helst gliðin

Hóast hann er vorðin lagdur undir skurð fyri fáum døgum síðani, so er sterki maðurin úr Litava fryntligur, tá biðið verður um eitt prát. Tað merkist tó á honum, at hann er eitt sindur mótleysur og kanska eisini eitt sindur vónsvikin, men hetta er so sanniliga til at skilja.

Sjálvur sigur Zydrunas Savickas, at skaðin hendi, tá hann luttók í Millwalk, sum er ein grein í Atlantic Giant kappingini, hann veit ikki reiðiliga at siga okkum, hvussu skaðin hendi, men hann metir tað vera sannlíkt, at hann er gliðin, og hetta hevur eftir øllum at døma ávirka knøini somikið, at hann fall til jarðar.

Kanningar á Landssjúkrahúsinum skuldu seinni vísa, at tað var spongin, sum gongur úr knænum oman í beini, sum er slitnað báðu megin við. Hetta er ein sera sjálvsamur skaði, og skyldast hesin skaðin mestir ovurløðu. Johannis Mortensen, yvirlækni, sigur, at hetta er einastu ferð, at hann hevur upplivað ein tílíkan skaða í Føroyum, men hann hevur sæð hetta uttanlands. Johannis sigur víðari, at hann ikki kann siga, hvussu leingi tað fer at taka hjá Zydrunas Savickas at koma fyri seg, men teir hava sett eitt ár sum minsta mark, men hetta eigur at verða tikið við fyrivarni. Viðgerðin av Zydrunas Savickas fer í framtíðini at ganga fyri seg í heimlandinum. Sum nú er, kann litavin ikki boyggja beinini nakað serligt, hann gongur eisini við høkjum. So við og við er ætlanin, at hann skal kunna fóta sær meira. Tað skal eisini viðmerkjast, at Zydrunas Savickas hevur sett sær sum eitt mál, at hann skal vera við aftur til Atlantic Giant kappingina næsta ár.

## Lá á odda

Áðrenn hann var fyri óhappinum, stóð rættiliga væl til hjá Savickas. Hann vann fyrstu tvær kappingargreinarnar, men tað gekk ikki so væl í triðju greinini, men hann lá framvegis á einum øðrum plássi, tá skaðin hendi í Millwalk, sum var fjórða greinin kappast var í.

Í Millwalk verður gingið í ring við einari tungari byrðu. Zydrunas Savickas sigur, at hann hevur sæð onkran líknandi tilburð sum hendan áður, men hetta er tó sjálvsamt.

Hetta er fyrsti stóri skaðin, sum stóri og sterki litavin hevur havt síðani hann byrjaði at kappast. Hann sigur, at hann ikki metti hetta sum eina vandamikla ítrótt, men nú hevur hann fingið okkurt at hugsað um.

## Fer heimaftur

Eftir ætlan skal Zydrunas Savickas útskrivast ein av næstu døgunum. Hetta merkir, umframt tað, at onkur annar má átaka sær heitið sum sterkasti maður á B5, at tann uppvenjing, sum skal til, fer at ganga fyri seg í heimlandinum hjá honum, Litava.

Zydrunas Savickas gleðir seg at koma heimaftur, men tað var ikki ætlanin at koma aftur so skaddur. Savickas fæst fyri tað nógva við at venja. Hann hevur tó eisini eitt starv á einari heilsumiðstøð, men nógv mest tíð fer til at venja. Hann venur einar 5-6 ferðir um vikuna og vant verður upp til einar 4-5 tímar um dagin. Savickas hevur fingið góð úrslit í kappingum undan hesari, og hansara higartil besta úrslit var, tá hann gjørdist nummar tvey í EM.

Zydrunas Savickas vil fegin rósa Atlantic Giant kappingini, og hospitalverkið í Føroyum fær eisini nøkur rósandi orð við á vegnum.

Vit her á Sosialinum ynskja Zydrunas Savickas góðan betring, og vit vóna at síggja hann aftur í Føroyum. Somuleiðis mugu vit staðfesta, at B5 stendur nakað veikari, nú hesin framúr fryntligi risin er farin.